Betri Pensjón P/F

# Ársfrásøgn 2019







# Innihaldsyvirlit


5 ára yvirlit 4
Leiðslufrágreiðing 5
Ársroknskapur 1. januar – 31. desember 9
Fíggjarstøða 31. desember 10
Eginognsuppgerð 12
Notur til ársfrásøgnina 13
Leiðsluátekning 23
Átekning frá innanhýsis grannskoðara 24
Átekning frá óheftum grannskoðara 25
Partafelagsupplýsingar 27

# 5 ára yvirlit

| Høvuðstøl (1.000 kr.) | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 159.397 | 145.623 | 142.012 | 121.008 | 114.493 |
| Tryggingarveitingar | -38.896 | -37.480 | -36.124 | -24.528 | -27.823 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 118.739 | -27.706 | 35.151 | 48.274 | 35.878 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -13.367 | -11.131 | -11.314 | -11.684 | -14.732 |
| Úrslit av endurtrygging | -735 | -737 | -645 | -651 | -746 |
| Tryggingartekniskt úrslit | 8.829 | 1.168 | 3.338 | 5.417 | -15.483 |
| Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutr. | -1.368 | 799 | 1.777 | 610 | 525 |
| Ársúrslit | 10.240 | 2.017 | 5.639 | 5.948 | -5.554 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur | 1.391.891 | 1.178.279 | 1.109.891 | 986.543 | 863.578 |
| Eginogn í alt | 80.413 | 70.173 | 69.503 | 43.864 | 37.916 |
| Ognir í alt | 1.484.045 | 1.257.957 | 1.189.191 | 1.036.852 | 906.687 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Avkastpst., knýtt at marknaðarrentuproduktum [1] | 9,2% | | | | |
| Váði í avkasti, knýtt at marknaðarrentuproduktum [1] [2] | 2 | | | | |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 723 kr. | 645 kr. | 693 kr. | 779 kr. | 1.144 kr. |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 1,0% | 1,0% | 1,1% | 1,3% | 1,8% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 13,6% | 2,9% | 9,9% | 14,5% | -13,6% |
| Solvensdekningur | 271,1% | 257,7% | 264,1% | 162,3% | 135,4% |

**Viðmerking**
1) Lyklatølini eru nýggj sambært broyttu kunngerðini um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum v.m., tí eru ongi tøl fyri árini 2015 til 2018.
2) Talið sipar til váðabólk, sum greitt frá undir Notu 14 í roknskapinum.

# Leiðslufrágreiðing

Betri Pensjón P/F er eitt lívstryggingar- og pensjónsfelag, ið selur pensjónsloysnir til føroyska marknaðin.

**Árið 2019**
Úrslitið hjá Betri Pensjón P/F í 2019 eftir skatt gjørdist eitt avlop á 10,2 mió. kr. samanborið við 2,0 mió. kr í 2018. Avlopið er í mestan mun økt orsakað av gongdini á fíggjarmarknaðum og eini lagaligari skaðagongd í árinum.

Úrslitið fyri 2019 verður mett nøktandi.

Samlaðu tryggingargjøldini í 2019, íroknað innskot og pensjón flutt frá øðrum feløgum, vóru 160,1 mió. kr samanborið við 146,4 mió kr. í 2018.

**Íløguvirksemi**
Partabrøvini góvu í árinum 21,7% í samlaðum avkasti, meðan avkastið frá lánsbrøvum var 1,5%.

**Fíggjarstøðan**
Fíggjarstøðan hjá felagnum øktist úr 1.258,0 mió. kr. í 1.484,0 mió. kr. í 2019. Avsetingarnar fyri Unit-Linked avtalur øktust úr 1.168,7 mió. kr. í 1.379,8 mió. kr.

Eginognin var 80,4 mió. kr. við árslok 2019 samanborið við 70,2 mió. kr. í 2018.

**Býtið av ársúrslitinum**
Nevndin mælir til at útluta 5,1 mió.kr. í vinningsbýti, og at 5,1 mió.kr. verða fluttar til komandi ár.

**Útlit fyri 2020**
Útlitini hjá Betri Pensjón P/F fyri 2020 eru góð. Tað verður støðugt arbeitt við at røkka so nógvum kundum, sum tilber.

Tað er ilt at meta um gongdina á virðisbrævamarknaðunum, sum ávirkar úrslitið hjá felagnum.

Samanumtikið væntar felagið vøkstur í tali av kundum og tryggingargjøldum, og roknar við, at avlopið í 2020 verður millum 3,0 mió.kr. og 6,0 mió.kr.

**Hendingar eftir árslok**
Frá degnum fyri fíggjarstøðuni við árslok 2019 til í dag er onki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

**Útveiting**
Ein partur av umsitingarligu uppgávunum eru útveittar við útveitingaravtalum, harav ein týðandi partur er útveittur til systurfelagið Betri Trygging P/F.

**Vitanartilfeingi**
Fyri Betri Pensjón P/F er tað av alstórum týdningi, at starvsfólk hava høgt vitanarstøði. Tí setir felagið krav um, at starvsfólk, ið loysa uppgávur fyri felagið, verða tryggjað viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving fyri at økja førleikarnar, so felagsins kundum verður veitt hollasta ráðgeving.

**Menning**
Felagið leggur stóran dent á at betra um kappingarføri við øðrvísi tryggingarvørum. Tað verður støðugt arbeitt við menning á økinum.

**Virkisgongdir**
Fyri at tryggja, at allir viðkomandi kundaupplýsingar eru til taks og lætt atkomiligar, verður arbeitt miðvíst við at goyma hesar ravtøkniliga (elektroniskt). Arbeitt verður miðvíst við at hava dagførda og nútímans heimasíðu. Heimasíðan skal verða besti miðilin hjá kundanum at koma í samband við felagið. Á heimasíðuni skal kundin finna allar upplýsingar um síni pensjóns- og tryggingarviðurskifti.

**Tøknifrøði**
Stórur dentur verður lagdur á rakstrartrygdina í teimum tøkniligu loysnunum, sum valdar verða. Støðugt verður arbeitt við at styrkja um KT-trygdina, sum er grundað í KT-politikk, sum ásetur tey yvirskipaðu trygdarkrøvini.

Menning og rakstur av kjarnuskipanum eru løgd hjá uttanhýsis veitara. Hetta er gjørt fyri at tryggja framhaldandi menning og rakstrartrygd, eisini við atliti til tilfeingi og kostnað.

**Compliance og Ábyrgd**
Fyri at tryggja, at leiðreglur, politikkir og reglugerðir verða hildnar, er regulætlan (compliance) gjørd. Hon skal tryggja, at greiður leistur er viðvíkjandi endurskoðan og eftirmeting av øllum leiðreglum, politikkum og reglugerðum á hvørjum ári. Stjórnin hevur ábyrgdina av, at reglugerð, leiðreglur og politikkir verða fylgd.

Regulvørðurin (ábyrgdarhavandi av compliance) hevur árliga samrøður við viðkomandi starvsfólk fyri at staðfesta, hvørt leiðreglur og politikkir verða fylgd í verki.

Á hvørjum ári eftirmetir nevndin reglugerðir, leiðreglur og politikkir, og tekur støðu til, um dagføringar skulu gerast. Soleiðis verður tryggjað, at allar reglugerðir, leiðreglur og politikkir hjá felagnum støðugt fylgja ásettum lógarkrøvum, og at eftirlit er við, at hesi verða fylgd í verki.

**Stýring av váða**

Betri Pensjón P/F metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava neiliga ávirkan á møguleikar felagsins at røkka handilsligum málum. Felagið nýtir væl skipaðar mannagongdir til at stýra váðunum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórn og leiðsla alsamt halda eyga við, verða hildnar.

## Marknaðarváðar

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| Rentuváði<br><br>Partabrævaváði<br><br>Mótpartsváði<br><br>Gjaldførisváði | Yvirskipaða málið við íløguvirksemi felagsins er at fáa sum mest avkast við einum ásettum váðastøði, sum nevndin setur.<br><br>Miðað verður eftir at hava eina rímuliga spjaðing av íløgunum. | Nevndin í Betri Pensjón P/F hevur samtykt ein íløgu--politikk, sum ásetur karmarnar fyri íløgur felagsins. Íløgupolitikkurin verður dagførdur eftir tørvi og í minsta lagi árliga.<br><br>Marknaðarváðin verður avmarkaður við, at felagið grundar sítt virksemi á Unit-Linked tryggingar, har kundin bera allan íløguváðan.<br><br>Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í íløguprógv við undirliggjandi lánsbrøvum og partabrøvum.<br><br>Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í tøkum peningi og í íløguprógvum, sum skrásett eru í keypsskálum.<br><br>Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at samstarva við íløguumsitarar, sum hava drúgvar royndir og gott orð á sær.<br><br>Støðugt verða gjørdar frágreiðingar um íløgugongd felagsins. |

## Tryggingarváðar

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| Livitíð/æviskeið<br><br>Deyðstíttleiki<br><br>Avlamnistíttleika<br><br>Spjaðing | Lønandi virksemi á øllum tryggingarproduktum.<br><br>Váðaspjaðing millum tryggingar- og kundabólkar.<br><br>Avmarkandi úrslitsávirkan frá einstøkum skaðahendingum við endurtrygging. | Felagið brúkar prísásetingaramboð, sum taka hædd fyri váðunum og marknaðarstøðuni.<br><br>Greiðar inntekningarreglur.<br><br>Váðajavning við endurtrygging og við hámørkum fyri ymsum tryggingardekningum.<br><br>Gott dátugrundarlag. |

## Operationellur váði

| Týdningarmestu váðarnir | Val í mun til váðar | Váðalækkandi virksemi |
|---|---|---|
| KT-váðar<br>Løgfrøðiligir váðar<br>Umsitingarligir váðar<br>Svik<br>Umdømi<br>Strategi | Ásannað verður og góðtikið, at tað neyvan ber til heilt at sleppa undan rakstrarligum váðum. Tó skulu hesir støðugt avmarkast til støðið, sum nevndin góðtekur. | Felagið avmarkar operationellan váða við politikkum, leiðreglum, innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hesi verða alsamt endurskoðað og dagførd.<br><br>Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør.<br><br>Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu, opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan. |

**Etiskar reglur í sambandi við íløgur**
Betri Pensjón P/F setur stór krøv til, hvussu samanspardi peningurin verður umsitin, og hvørji etisk krøv verða sett til íløgurnar. Dagført yvirlit yvir fyritøkur, sum eru fevndar av íløguprógvum felagsins, er til skjals á heimasíðunum 'sparinvest.dk' og 'sparindex.dk'.

**Váðaframtíðarmynd**
Váðaviðurskiftini eru myndað í talvuni niðanfyri. Talvan vísir váðaviðurskiftini undir teimum settu fyritreytunum fyri teir týdningarmestu váðafaktorarnar. Teir settu faktorarnir skulu ikki takast sum væntanirnar hjá felagnum, men skulu einans takast sum dømi.

| Váðaviðurskifti við ymiskum framtíðarmyndum - tølini eru eftir skatt | Váða-mynd | Samlað ávirkan á úrslit (t.kr.) | Broyting í eginogn felagsins |
|---|---|---|---|
| **31. desember 2019** | | | |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | a | -1.114 | -1,4 % |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | b | 1.114 | 1,4 % |
| Partabrøv | c | -1.444 | -1,8 % |
| Fastogn | d | 0 | 0 |
| **31. desember 2018** | | | |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | a | -1.091 | -1,5 % |
| Rentuberandi fíggjarkrøv | b | 1.091 | 1,5 % |
| Partabrøv | c | -906 | -1,3 % |
| Fastogn | d | 0 | 0 |

**Váðamyndir:**
a) Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig
b) Rentulækking uppá 0,7 prosent stig
c) Partabrævalækking á 12 prosent
d) Fall í marknaðarvirðinum á bygningum á 8 prosent

**Kapitalstyrki**
Niðanfyri er yvirlit, ið vísir kapitalstyrkina hjá Betri Pensjón P/F í mun til tryggingarskyldurnar:

| DKK 1.000 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| Eginogn | 80.413 | 70.173 |
| Immateriel ogn | 0 | 312 |
| Útsett skattaáogn | 387 | 299 |
| Vinningsbýti | 5.100 | |
| **Grundarfæfeingi** | **74.926** | **69.562** |
| Fæfeingiskrav | 27.638 | 27.629 |
| **Kapitalstyrki** | **47.288** | **41.933** |

Við árslok 2019 var kapitalstyrkin hjá felagnum 47,3 mió.kr. í mun til 41,9 mió.kr. við árslok 2018. Mett verður, at felagið hevur neyðugu fíggjarligu styrkina við atliti til galdandi lógarkrøv.

Viðmerkjast skal, at fæfeingiskravið er 3,7 mió. evrur (27,6 mió kr.)

**Individuellur solvenstørvur**
Tann 1. januar 2019 vórðu settar í gildi nýggjar kunngerðir um solvens og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum, og um at gera upp grundarfæfeingi í tryggingarfeløg v.m.. Eftir hesum skal grundarfæfeingið hjá tryggingarfeløgum vera størri enn individuelli solvenstørvurin og/ella fæfeingiskravið. Individuelli solvenstørvurin verður gjørdur upp eftir standardfrymilinum í skjali 1 til kunngerð um solvens og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum. Felagið hevur sett í verk hesar broytingar.

Sum fastur táttur í váðastýringini, eyðmerkir og nøgdargreinar nevndin minst eina ferð um árið allar týdningarmiklar váðar hjá felagnum. Fyri hvønn váðabólk verður ásett eitt kapitalkrav, sum nýtt verður í sambandi við uppgerð av individuella solvenstørvinum. Váðametingin er í høvuðsheitinum grundað á politikkir, sum hvørt ár verða viðgjørdir og góðkendir av nevndini. Í uppgerðini av individuella solvenstørvinum tekur felagið støði í Solvens II frá ES.

Individuelli solvenstørvurin hjá Betri Pensjón P/F er 16,4 mió. kr., og er hetta minni enn fæfeingiskravið upp á 3,7 mió. EUR, svarandi til 27,6 mió.kr. við árslok 2019.

Nýggja kunngerðin um leiðslu og stýring av tryggingarfeløg-

um o.ø. ásetir m.a., at nevndin skal gera eina meting av felagins vágum og solvensi, og greina hetta í frágreiðing, kallað ORSA-frágreiðing. Henda skal latast Tryggingareftirlitinum á hvørjum ári, í seinasta lagi 1. mai. Í kunngerðini eru ein røð av krøvum til frágreiðingina. Arbeitt verður við at skriva ORSA-frágreiðingina, so hon lýkur hesi krøv.

Felagið skal harumframt hava hesi lyklavirksemi: Váðastýring, compliance, aktuar og innanhýsis grannskoðan. Felagið hevur skipað hesi virksemi.

# Eigaraviðurskiftir

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F og eigur allan partapeningin í felagnum.

**Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn**
Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn sambært § 129a í Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

## Helgi L Petersen
Stjóri

**Nevndarsessir**
Nevndarlimur: Fastogn P/F

## Bogi P. Nielsen
Formaður

**Nevndarsessir**
Nevndarformaður: P/F í Ánunum
Nevndarformaður: P/F Gervi
Nevndarlimur: P/F Bergfrost
Nevndarlimur: P/F Skipafelagið Føroyar (Holdingfelag)
Nevndarlimur: P/F Faroe Ship Føroyar.

**Stjóri**
Dettifoss Line Sp/f
Faroe Ship P/F
Faroe Ship Føroyar P/F
Godafoss Line Sp/f
Lagerfoss Line Sp/f
Selfoss Line Sp/f
Skipafelagið Føroyar P/F

## Evy J. Jacobsen
Næstforkvinna

**Nevndarsessir**
Næstforkvinna: Betri Banki P/F
Nevndarlimur: Betri Trygging P/F
Nevndarlimur: Fastogn P/F

**Stjóri**
Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á. (forstjóri)
Betri P/F
Betri Íløgur P/F

## Petur Elias Nielsan
Nevndarlimur

**Nevndarsessir**
Nevndarlimur: Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á.
Nevndarlimur: Betri P/F

## Herjolvur P. Jacobsen
Nevndarlimur

**Nevndarsessir**
Nevndarformaður: Bókamiðsølan P/F

# Rakstrarroknskapur

| Nota | DKK 1.000 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| 2 | Tryggingargjøld brutto | 160.131 | 146.360 |
| | Endurtryggingargjøld | -735 | -737 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **159.397** | **145.623** |
| | **Íløguvirksemi** | | |
| 3 | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 11.392 | 18.601 |
| 4 | Virðisjavningar | 110.881 | -42.831 |
| | Rentuútreiðslur | 0 | -10 |
| | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -3.534 | -3.465 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **118.739** | **-27.706** |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning** | | |
| 5 | Útgoldnar veitingar | -37.832 | -38.612 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-37.832** | **-38.612** |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning** | | |
| 14 | Broyting í lívstryggingaravsetingum | -213.217 | -66.716 |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning í alt** | **-213.217** | **-66.716** |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning** | | |
| | Útveganarkostnaður | -5.433 | -4.590 |
| | Fyristingarkostnaður | -7.935 | -6.541 |
| 6 | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-13.367** | **-11.131** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | -4.890 | -291 |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **8.829** | **1.168** |
| 7 | Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi | -1.368 | 799 |
| | Íløguúrslit av eginognini | 4.890 | 291 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **12.351** | **2.258** |
| 8 | Skattur | -2.111 | -241 |
| | **Úrslit** | **10.240** | **2.017** |

| Nota | DKK 1.000 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| | **Fíggjarstøða** | | |
| | **Ogn** | | |
| 9 | **Immateriell ogn** | **0** | **312** |
| | **Materiell ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 0 | 200 |
| 10 | **Materiell ogn í alt** | **0** | **200** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 62.097 | 59.548 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 28.441 | 16.727 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt** | **90.538** | **76.275** |
| 11 | **Íløguogn í alt** | **90.538** | **76.275** |
| 11, 12 | **Íløguogn, tengd at marknaðarrentuproduktum** | **1.379.756** | **1.168.667** |
| | **Áogn** | | |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur** | | |
| | Áogn hjá tryggingartakarum | 3.955 | 4.415 |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt** | **3.955** | **4.415** |
| | Onnur áogn | 62 | 285 |
| | **Áogn í alt** | **4.017** | **4.700** |
| | **Onnur áogn** | | |
| 8 | Útsett skattaáogn | 387 | 299 |
| | **Onnur áogn í alt** | **387** | **299** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Rentur tilgóðar og innvunnin leiga | 32 | 32 |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 9.316 | 7.474 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **9.347** | **7.506** |
| | **OGN Í ALT** | **1.484.045** | **1.257.957** |

| Nota | DKK 1.000 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|

# Fíggjarstøða

## Skyldur

| Nota | | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 70.000 | 70.000 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 29.900 | 35.000 |
| | Framflutt úrslit | -24.587 | -34.827 |
| | Uppskot til vinningsbýti | 5.100 | 0 |
| 13 | **Eginogn í alt** | **80.413** | **70.173** |
| | | | |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur** | | |
| 14 | Lívstryggingaravsetingar | 1.390.461 | 1.177.529 |
| | Avsett til endurgjøld | 1.430 | 750 |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt** | **1.391.891** | **1.178.279** |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í samband við beinleiðis trygging | 279 | 470 |
| | Skuld til atknýtt virkir | 2.561 | 723 |
| | Onnur skuld | 4.947 | 4.201 |
| | **Skuld í alt** | **7.786** | **5.394** |
| | | | |
| | **Tíðaravmarkingar** | **3.954** | **4.111** |
| | | | |
| | **SKYLDUR Í ALT** | **1.484.045** | **1.257.957** |

1 Nýttur roknskaparháttur
11 Útgreining av ognum og teirra avkasti
15 Eventualskyldur og trygdarveitingar
16 Nærstandandi partar
17 Handlar við nærstandandi partar
18 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum

# Eginognsuppgerð

| DKK 1.000 | Parta-<br>peningur | Yvirkurs-<br>grunnur | Flutt<br>úrslit | Uppskot til<br>vinningsbýti | Eginogn |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn við ársbyrjan 2018** | **70.000** | **35.000** | **-35.497** | | **69.503** |
| **Rørslur á eginognini í 2018** | | | | | |
| Ársúrslit | | | 2.017 | | 2.017 |
| **Eginogn við ársenda 2018** | **70.000** | **35.000** | **-33.480** | **0** | **71.520** |
| **Broytingar í nýttum roknskaparhátti pr. 1 januar 2019** | | | -1.347 | | -1.347 |
| **Eginogn við ársbyrjan 2019** | **70.000** | **35.000** | **-34.827** | | **70.173** |
| **Rørslur á eginognini í 2019** | | | | | |
| Ársúrslit | | -5.100 | 10.240 | 5.100 | 10.240 |
| **Eginogn við ársenda 2019** | **70.000** | **29.900** | **-24.587** | **5.100** | **80.413** |

# Notur til ársfrásøgnina

**Nota** **DKK 1.000**

**1** **Nýttur roknskaparháttur**

## Alment

Ársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 4).

Nýttur roknskaparháttur er broyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2018. Orsøkin er, at nýggja kungerðin um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum v.m. ásetir, at feløgini skulu seta av eitt váðaískoyti, sum samsvarar við ta upphædd, sum rindað verður aðrari tryggingarfyritøku fyri váðan, sum stavar frá at kostnaðir av at avgreiða avsettu skaðarnar verða øðrvísi, enn avsett er til tryggingargjøld og til endurgjøld. Eginognin við ársbyrjan er tí minkað við 1,3 mió.kr., samstundis sum settar eru av 1,6 mió.kr. sum serstøk upphædd fyri váðaískoyti og 0,3 mió.kr. skrásettar sum útsett skattaogn.

Nýttur roknskaparháttur er annars óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2018.

**Avrunding av upphæddum**
Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av einstøku tølunum.

**Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini**
Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – herímillum tryggingarveitingar og broyting í avsetingum – sum eru við til at røkka ársins inntøku.

**Konsernviðurskifti og nærstandandi partar**
Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

**Roknskaparligar metingar**
Roknskaparliga virðið á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

**Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan**
Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Leypandi verða transaktiónir í útlendskum gjaldoyra umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á transaktiónsdegnum.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

**Rakstrarúrslit**
Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2019 eftir kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

## Rakstrarroknskapurin

**Tryggingargjøld f.e.r.**
Upphæddin fevnir um brutto tryggingarinntøkur javnað fyri latin endurtryggingargjøld.

**Úrslit av íløguvirksemi**
Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevnir um ársins rentuinntøku av innlánum, virðisbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum. Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavning av virðisbrøvum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

**Tryggingarveitingar**
Goldnar veitingar í árinum, umframt broyting í avseting-

um til endurgjøld frádrigið endurtryggjarans part, verða innroknaðar sum tryggingarveitingar. Upphæddin fevnir eisini um afturkeyp av tryggingargjøldum og afturberingar av tryggingargjøldum.

**Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi**
Tann parturin av rakstrarkostnaðinum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis kann knýtast at fasthaldan av verandi tryggingum og/ella at nýtekningum, er vístur undir nýtekningarútreiðslum.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um útreiðslur, sum eru nýttar í sambandi við umsiting av verandi tryggingum og av tíðargreinaðum útreiðslum, ið viðvíkja roknskaparárinum.

**Flutt úrslit av íløguvirksemi**
Fevnir um tann partin av úrslitinum av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

**Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi**
Vísir tryggingartekniska úrslitið av felagsins sjúkra- og vanlukkutryggingarsáttmálum. Úrslitið er útgreinað í notu við niðanfyristandandi linjum:

- **Tryggingargjøld fyri egna rokning**
  Uppkravd tryggingargjøld við frádrátti av møguligum endurtryggingargjaldi.

- **Skaðaendurgjøld**
  Fevnir um goldnar veitingar í árinum við frádrátti av møguligum endurgjaldi frá endurtryggjarum og javningar av rørslum í skaðaavsetingum viðvíkjandi sjúkra- og vanlukkutryggingarsáttmálum.

  Skaðaendurgjøld fyri egna rokning fevnir soleiðis um kend og væntað skaðaendurgjøld í roknskaparárinum og eisini møguligt úrslit av endurgjaldsavsetingum.

  Skaðatiltak viðvíkjandi sjúkra- og vanlukkutrygging er í fíggjarstøðuni víst í linjuni endurgjaldsavsetingar, ið eisini inniheldur lívstryggingaravsetingar.

- **Rakstrarkostnaður**
  Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur tilknýti til sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi.

**Skattur**
Skattur av ársúrslitinum er roknaður skattur við 18% við støði í úrsliti áðrenn skatt, tillagað fyri ikki skattskyldugar inntøkur og útreiðslur. Útreiðsluførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti.

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá, at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuna í sama tíðarskeiði.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri.

Felagið er samskattað við móðurfelagið, Betri P/F. Í tann mun skattlig hall verða nýtt av øðrum feløgum í samskattingini, verður skattavirðið av hallinum goldið tí felagnum, sum letur hallið frá sær.

## Fíggjarstøðan

**Immateriell ogn**
Immateriell støðisogn verður upptikin til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini, tó í mesta lagi í 20 ár.

Avskrivingartíðarskeið: Ritbúnað 5-7 ár

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett, um tørvur er á niðurskriving.

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivingartíðarskeið:
Akfør 3 ár
Innbúgv 3-7 ár
Edv-útgerð 3-7 ár

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett, um tørvur er á niðurskriving.

**Íløguognir**
Virðisbrøv verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning virðissett til dagsvirðið. Handlað virðisbrøv verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Dagsvirði á børsskrásettum virðisbrøvum verður gjørt upp við støði í børsskrásetta endakursinum við árslok.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

**Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur**
Avsetingar til Unit-Linked avtalur fevnir um goldin inngjøld við ískoyti av virðisjavningum og við frádrátti av útgjøldum og fyrisitingarkostnaði.

Avsetingar til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum umfatar skyldur til at veita bonus og avsláttur av inngoldnum tryggingargjøldum v.m.

Avsetingar til endurgjøld fevnir um fráboðaðar, men ikki útgoldnar tryggingarveitingar og eisini um móttikin eingangsinngjøld, ið enn ikki eru deild á Unit-Linked avtalur. Upphæddin fevnir harumframt um eina meting av tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

**Skuld**
Skuld verður mátað til amortiseraðan kostprís, og hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

**Útsettur skattur**
Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum.

Útsett skattaogn, harundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ognin kann væntast at kunna realiserast fyri.

**Tíðaravmarkingar**
Fevnir um forútgoldin váðagjøld.

**Aktuellur skattur**
Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

**Lyklatøl**
Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

| Nota | DKK 1.000 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| 2 | **Tryggingargjøld brutto** | | |
| | **Reglulig gjøld** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 27.865 | 18.989 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 89.144 | 79.826 |
| | **Reglulig gjøld í alt** | **117.009** | **98.815** |
| | **Eingangsgjøld** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 8.283 | 11.405 |
| | Tryggingar teknaðar í sambandi við starvsetan | 8.609 | 11.645 |
| | **Eingangsgjøld í alt** | **16.892** | **23.050** |
| | **Inntøkur frá samlagstryggingum** | **26.230** | **24.496** |
| | **Tryggingargjøld brutto í alt** | **160.131** | **146.360** |
| | **Herav gjøld** | | |
| | úr Føroyum | 160.131 | 146.360 |
| | úr EU-londum | 0 | 0 |
| | úr øðrum londum | 0 | 0 |
| | **Tryggingargjøld brutto í alt** | **160.131** | **146.360** |
| | Tryggingargjøld frá Unit-Linked tryggingum | 160.131 | 146.360 |
| | **Tryggingargjøld brutto í alt** | **160.131** | **146.360** |
| | **Tal av tryggjaðum** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 4.352 | 2.606 |
| | Tryggingar teknaðar í samband við starvsetan | 13.950 | 13.631 |
| | Samlagstryggingar | 14.465 | 13.692 |
| 3 | **Rentuinntøkur og vinningsbýti** | | |
| | Rentur av virðisbrøvum, innlánum og útlánum | 42 | 382 |
| | Vinningsbýti frá kapitalpørtum | 11.350 | 18.219 |
| | **Rentuinntøkur og vinningsbýti í alt** | **11.392** | **18.601** |
| 4 | **Virðisjavningar** | | |
| | Partabrøv | 93.022 | -43.133 |
| | Lánsbrøv | 17.859 | 302 |
| | **Virðisjavningar í alt** | **110.881** | **-42.831** |
| 5 | **Útgoldnar veitingar** | | |
| | Eftirløn | -13.018 | -5.149 |
| | Eingangsútgjøld við deyða | -5.290 | -12.870 |
| | Eingangsútgjøld við pensionering | -8.344 | -7.228 |
| | Avlamisveitingar | -4.554 | -7.853 |
| | Afturkeyp | -4.491 | -2.132 |
| | Bonus og avsláttur | -2.136 | -3.381 |
| | **Útgoldnar veitingar í alt** | **-37.832** | **-38.612** |

| Nota | DKK 1.000 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| 6 | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning** | | |
| | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir | -4.331 | -3.825 |
| | Eftirlønir | -691 | -648 |
| | Aðrir kostnaðir til almannatrygd | -214 | -183 |
| | Lønarhæddaravgjald | -437 | -420 |
| | Aðrir starvsfólkakostnaðir | -516 | -328 |
| | **Starvsfólkakostnaður í alt** | **-6.189** | **-5.405** |
| | **Herav løn og samsýning til nevnd og stjórn** | | |
| | Nevndarsamsýning* | -293 | -186 |
| | Stjórn** | -1.313 | -1.305 |
| | *Av hesum hevur Mortan Poulsen fingið 37 tkr, Bogi P. Nielsen 153 tkr., Petur Elias Nielsen 42 tkr og Herjolvur P. Jakobsen fingið samlaðar 61 tkr. | | |
| | **Umframt upplýstu tøl, hevur stjórnin eisini frían bil og frítt fjarsamskifti. | | |
| | **Fulltíðarstørv** | **7** | **7** |
| | **Samsýning til grannskoðarar** | | |
| | **Januar løggilt grannskoðanarvirki P/F** | | |
| | Grannskoðan | -42 | -42 |
| | Aðrar váttanir | -30 | -30 |
| | Aðrar tænastuveitingar | -100 | 0 |
| | **Samlað samsýning til Januar løggilt grannskoðanarvirki P/F** | **-172** | **-72** |
| | **PricewaterhouseCoopers Statsautoriseret Revisionspartnerselskab** | | |
| | Grannskoðan | -62 | -62 |
| | **Samlað samsýning til PricewaterhouseCoopers Statsautoriseret Revisionspartnerselskab** | **-62** | **-62** |
| | **Samsýning til grannskoðarar** | | |
| | Grannskoðan | -104 | -104 |
| | Aðrar váttanir | -30 | -30 |
| | Aðrar tænastuveitingar | -100 | 0 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar í alt** | **-234** | **-134** |
| 7 | **Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingingarvirksemi** | | |
| | Tryggingargjøld fyri egna rokning | | |
| | Tryggingargjøld brutto | 6.540 | 6.040 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **6.540** | **6.040** |
| | **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning** | | |
| | Útgoldnar veitingar | -6.426 | -4.542 |
| | Broyting í avsetingum til endurgjøld | -680 | -30 |
| | **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt** | **-7.106** | **-4.572** |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi** | | |
| | Nýtekningarkostnaður | -12 | -19 |
| | Fyristingarkostnaður | -790 | -650 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi í alt** | **-802** | **-669** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi í alt** | **-1.368** | **799** |

| Nota | DKK 1.000 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| 8 | **Skattur** | | |
| | Úrslit áðrenn skatt | 12.351 | 2.258 |
| | **Skattur 18%** | **-2.223** | **-406** |
| | Skattur í samskatting | 2.199 | 337 |
| | Broyting í útsettum skatti | -88 | -96 |
| | **Skattur sambært ársfrásøgn** | **2.111** | **241** |
| | **Avstemmað skattaupphædd** | **2.111** | **241** |
| | **Útsettur skattur** | | |
| | Immateriell ogn | 0 | 56 |
| | Rakstrargøgn | -64 | -59 |
| | Váðaískoyti | -296 | -296 |
| | **Útsettur skattur í alt** | **-387** | **-299** |
| 9 | **Immateriell ogn** | | |
| | Útveganarvirði við ársbyrjan | 10.990 | 10.990 |
| | **Útveganarvirði við ársenda** | **10.990** | **10.990** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | -10.679 | -10.310 |
| | Avskrivingar í árinum | -312 | -369 |
| | **Av- og niðurskrivingar við ársenda** | **-10.991** | **-10.679** |
| | **Roknskaparligt virði við ársenda** | **0** | **312** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **312** | **681** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **5-7 ár** | **5-7 ár** |
| 10 | **Materiell ogn** | | |
| | Útveganarvirði við ársbyrjan | 2.379 | 2.379 |
| | **Útveganarvirði við ársenda** | **2.379** | **2.379** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | -2.180 | -1.980 |
| | Avskrivingar í árinum | -200 | -200 |
| | **Av- og niðurskrivingar við ársenda** | **-2.380** | **-2.180** |
| | **Roknskaparligt virði við ársenda** | **0** | **200** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **199** | **399** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **3-7 ár** | **3-7 ár** |

**Nota** **DKK 1.000**

**11** **Útgreining av ognum og teirra avkasti**

| Mió.kr. | Marknaðarvirði Primo | Ultimo | Avkast fyri skatt |
|---|---|---|---|
| 2.1 Ognarpartar, skrásettir í keypsskálum | 426,3 | 536,6 | 23,8% |
| 2.2 Ikki skrásettir ognarpartar | | | |
| **2. Ognarpartar í alt** | **426,3** | **536,6** | **23,8%** |
| 3.1 Stats- og realkreditlánbrøv | 676,9 | 775,5 | 0,6% |
| 3.3 Virkislánsbrøv | 115,6 | 120,1 | 7,2% |
| **3. Lánsbrøv í alt** | **792,5** | **895,6** | **1,5%** |

Avkastið fyri einstøku íløguognirnar er roknað eftir tíðarvigaða háttinum, har avkast dagliga verður útroknað.

**12** **Íløguognir, knýttar at Unit-Linked tryggingaravtalum**

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| **Býti av íløguognum uttan trygd** | | |
| Partabrøv | 513.437 | 423.594 |
| Lánsbrøv | 856.646 | 735.704 |
| Reiður peningur* | 9.673 | 9.369 |
| **Íløguognir, knýttar at Unit-Linked tryggingaravtalum í alt** | **1.379.756** | **1.168.667** |

*Inngoldið av kundum í desember 2019 og íløga gjørd í januar 2020

**13** **Eginogn**

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| **Partapeningur** | | |
| Partapeningur við ársbyrjan | 70.000 | 70.000 |
| **Partapeningur í alt** | **70.000** | **70.000** |
| **Yvirkursgrunnur** | | |
| Yvirkursgrunnur við ársbyrjan | 35.000 | 35.000 |
| Uppskot til vinningsbýti | -5.100 | 0 |
| **Yvirskotsgrunnur við árslok** | **29.900** | **35.000** |
| **Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit við ársbyrjan | -34.827 | -36.844 |
| Flutt ársúrslit | 10.240 | 2.017 |
| **Flutt úrslit við árslok** | **-24.587** | **-34.827** |
| **Uppskot til vinningsbýti** | | |
| Uppskot til vinningsbýti | 5.100 | 0 |
| **Uppskot til vinningsbýti við árslok** | **5.100** | **0** |
| **Eginogn við árslok** | **80.413** | **70.173** |

**Partapeningur**

Samlaði partapeningurin í felagnum er eitt partabræv á 70.000 tkr., ið Betri P/F eigur.

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | | |
| Eginpeningur | 80.413 | 70.173 |
| Immateriell ogn | 0 | -312 |
| Uppskot til vinningsbýti | -5.100 | 0 |
| Útsett skattaáogn | -387 | -299 |
| **Grundarfæfeingið** | **74.927** | **69.563** |
| **Fæfeingiskrav** | **27.638** | **27.629** |

| Nota | DKK 1.000 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| 14 | **Lívstryggingaravsetingar** | | |
| | Lívstryggingaravsetingar við ársbyrjan | 1.172.333 | 1.103.084 |
| | Akkumulerað virðisjavnan við ársbyrjan | 5.196 | 6.087 |
| | **Afturlítandi avsetingar við ársbyrjan** | **1.177.529** | **1.109.171** |
| | Bruttotryggingarinntøkur | 160.131 | 146.360 |
| | Tryggingarveitingar | -37.832 | -38.612 |
| | Rentur v.m. | 115.177 | -27.997 |
| | Umsitingargjald | -9.777 | -9.086 |
| | Váðaúrslit | -14.023 | -1.416 |
| | **Afturlítandi avsetingar við ársenda** | **1.386.009** | **1.172.333** |
| | Savnað virðisjavnan við ársenda | 4.452 | 5.196 |
| | **Lívstryggingaravsetingar við ársenda** | **1.390.461** | **1.177.529** |

Í avsetingum til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum eru 3,1 mió.kr. skylda
til atknýtt felag

**Avkast og váði í 2019**

| **Ár til eftirløn** | **Partur av avsetingum** | **Avkast** | **Váði** |
|---|---|---|---|
| 30 ár (aldur 37 ár) | 1,93% | 13,44% | 2 |
| 15 ár (aldur 52 ár) | 3,76% | 9,58% | 2 |
| 5 ár (aldur 62 ár) | 1,52% | 5,74% | 2 |
| 5 ár eftir pensjónsaldur (aldur 72 ár) | 0,18% | 4,79% | 1 |

Bólkingin í talvuni omanfyri verður ásett út frá standardfrávikunum í mánaðarligu avkastunum seinastu 36 mánaðirnar.
Sí bólkingina í váðabólkar í talvuni niðanfyri

**Avkast og váði í 2019**

| **Váðabólkur** | | **Prosent** |
|---|---|---|
| | **SD≥** | **SD<** |
| 1,000 | 0,00 | 0,50 |
| 2,000 | 0,50 | 2,00 |
| 3,250 | 2,00 | 3,00 |
| 3,500 | 3,00 | 4,00 |
| 3,750 | 4,00 | 5,00 |
| 4,250 | 5,00 | 6,70 |
| 4,500 | 6,70 | 8,34 |
| 4,750 | 8,34 | 10,00 |
| 5,250 | 10,00 | 11,67 |
| 5,500 | 11,67 | 13,33 |
| 5,750 | 13,33 | 15,00 |
| 6,000 | 15,00 | 25,00 |
| 7,000 | 25,00 | |

Viðmerking: SD= standardeviation (standardfrávik)

| Nota | | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| 15 | **Eventualskyldur og trygdarveitingar** | | |
| | Sum trygd fyri tryggingartekniskar avsetingar eru skrásettar ognir uppá | 1.463.330 | 1.239.954 |

Felagið er samskattað við onnur feløg í samtakinum. Samskattaðu feløgini bera tí samábyrgd fyri samlaðu skattaskyldunum.

**16 Nærstandandi partar**

**Nevndu feløg hava týðandi ávirkan á Betri Pensjón P/F**

| Navn og heimstaður | Støði fyri ávirkan |
|---|---|
| Ognarfelag Tryggingartakaranna<br>Yviri við Strond 2<br>Postboks 34<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag hjá Betri P/F,<br>ger samtøkuroknskap. |
| Betri P/F<br>Yviri við Strond 2<br>Postboks 34<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag |

**Upplýsingar um nærstandandi partar**
Ognarfelag Tryggingartakaranna f.v.a.á. eigur øll partabrøvini í Betri P/F.

Betri P/F eigur øll partabrøvini í Betri Pensjón P/F og hevur tí avgerandi ávirkan á felagið.

Aðrir nærstandandi partar hjá felagnum eru nevndar- og stjórnarlimir í felagnum og atknýtt feløg, nevndar- og stjórnarlimir í hesum atknýttu feløgunum, umframt nærstandandi persónar hjá áður allýstu persónum.

Í farna árinum eru ikki gjørdir aðrir handlar við nevnd, stjórn, leiðarar ellar aðrar nærstandandi partar enn vanlig leiðslusamsýning og tað, ið nevnt er niðanfyri.

Samsýning til nevnd og stjórn er víst í notu 6.

Nota DKK 1.000

17 **Handlar við nærstandandi partar**
Felagið keypir tænastur frá móðurfelagnum og systirfeløgum í samtakinum.

Umsitingargjøld til og frá atknýttum feløgum í samtakinum verða avroknað á útreiðslunøktandi støði. Húsaleiga hjá atknýttum feløgum verður avroknað eftir marknaðartreytum.

Avtala er gjørd millum feløgini í samtakinum um renting av leypandi millumverandi og er hendan renta ásett eftir marknaðartreytum. Í árinum eru renturnar av leypandi millumrokning við atknýtt feløg samlað 0 tkr. (-10 tkr. í 2018).

Innistandandi hjá systurfeløgum í samtakinum verða rentað eftir vanligum marknaðartreytum. Av samlaðu innlánunum við árslok vóru 35,2 mió.kr. innistandandi hjá atknýttum felag (23,7 mió.kr. í 2018)

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| **Týðandi samhandlar við atknýtt feløg** | | |
| Íløgurøkt | -200 | -200 |
| Húsaleiga | -390 | -320 |
| Tænastu og umsitingargjald til atknýtt feløg | -4.906 | -4.502 |
| Afturbering | -3.108 | -367 |
| **Týðandi samhandlar við atknýtt feløg í alt** | **-8.604** | **-5.389** |

18 **Viðkvæmisgreining av fíggjarognum**

| **Hending** | **Minsta ávirkan á grundar-fæfeingið í tkr.** |
|---|---|
| Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig | -1.114 |
| Rentulækking uppá 0,7 prosent stig | 1.114 |
| Partabrævalækking á 12 prosent | -1.444 |
| Ognarprísalækking á 8 prosent | - |
| Valutakursváði (VaR 99,5 prosent) | 176 |
| Tap uppá mótpartar á 8% | 3.377 |
| Lækking í deyðatali á 10 prosent | -1.366 |
| Hækking í deyðatali á 10 prosent | 1.206 |
| Hækking í óarbeiðstali á 10 prosent | - |

Felagið hevur ikki gjørt avtalu um samløgubonusskipanir, og tí hava omanfyri nevndu hendingar onga ávirkan á felagið í mun til bonusmøguleikar.

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 2019 hjá Betri Pensjón P/F.

Ársfrásøgnin og leiðslufrágreiðingin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2019, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar 2019 - 31. desember 2019.

Tað er okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin gevur eina rættvísandi umrøðu av gongdini í virkseminum hjá Betri Pensjón P/F og fíggjarligu støðuni, umframt eina rættvísandi lýsing av teimum týðandi váðunum og óvissu faktorunum, sum felagið kann ávirkast av. Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin til góðkenningar.

**Betri Pensjón P/F**

Tórshavn, 28. februar 2020

**Helgi L. Petersen**
Stjóri

## Nevnd

| | |
|---|---|
| **Bogi P. Nielsen**<br>Formaður | **Evy J. Jacobsen**<br>Næstformaður |
| **Petur Elias Nielsen** | **Herjolvur P. Jakobsen** |

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend av ársaðalfundi felagsins

Tórshavn, hin / 2020

fundarstjóri

# Átekning frá innanhýsis grannskoðara

**Niðurstøða**
Tað okkara fatan, at ársroknskapurin fyri Betri Pensjón P/F gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2019 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2019 í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Okkara niðurstøða er í samsvari við okkara grannskoðanarprotokoll til grannskoðanarnevndina og nevnd felagsins.

**Framda grannskoðanin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Betri Pensjón P/F fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2019. Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Grannskoðanin er gjørd við støði í kunngerð frá Tryggingareftirlitinum um fremjan av grannskoðan av tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum og í tráð við altjóða ásetingar um grannskoðan viðvíkjandi planlegging og fremjan av grannskoðanararbeiðinum.

Vit hava lagt ætlan um og framt grannskoðanina so høg vissa fæst fyri, at ársroknskapurin ikki er fongdur við týðandi feilupplýsingum. Vit hava luttikið í grannskoðanini av øllum týðandi og váðakendum økjum.

Okkara fatan er, at tey fingnu grannskoðanarprógvini eru nøktandi og egnaði sum grundarlag fyri okkara niðurstøðu.

**Úttalilsi um leiðslufrágreiðingina**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu fyri leiðslufrágreiðingini.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa, um leiðslufrágreiðingin í munandi vavi ikki er í samsvari við ársroknskapin ella er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt at innihalda týðandi feilupplýsingar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa, um kravdu upplýsingarnar, eftir føroysku lógini um tryggingarvirksemi, eru við í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í okkara arbeiði er okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í føroysku lógini um tryggingarvirksemi. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, 28. februar 2020

**Petur A. Johannesen**
Samtaksgrannskoðanarleiðari

# Átekning frá óheftum grannskoðara

## Til kapitaleigararnar í Betri Pensjón P/F

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2019 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2019 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

**Hvat vit hava grannskoðað**
Ársroknskapin hjá Betri Pensjón P/F fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2019 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginpeningsuppgerð og notum, saman við nýttum roknskaparhátti felagsins. Undir einum nevnt "Ársfrásøgnin".

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardum fyri grannskoðan (ISA) og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin".

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Óheftni**
Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Niðurstøða okkara um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu fyri leiðslufrágreiðingini.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa, um leiðslufrágreiðingin ikki er í samsvari við ársroknskapin ella er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd við týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir føroysku tryggingarlóggávuni eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í okkara arbeiði er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í føroysku tryggingarlóggávuni.

Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

**Ábyrgd fyri roknskapinum og grannskoðanini**

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við føroysku tryggingarlóggávuna. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri, at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd leiðslunnar at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað hevur týdning at upplýsa um viðurskiftir viðvíkjandi framhaldandi rakstri, og at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, støðga rakstrinum ella, at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um hesir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um tað eru sannlíkindi fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan (ISA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tær grannskoðanaratgerðir, sum hesir váðar krevja og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri at týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan,

tilætlaðari dyljan, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til síðis.

- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til tann roknskaparhátt, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftum upplýsingum, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Taka støðu til um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskiftir, sum kunnu viðføra týðandi óvissu um, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskiftini í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið, tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskiftir og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi avdúkingar, herundir um týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Vit veita eisini teimum, ið hava ábyrgd av leiðslu, eina váttan um, at vit liva upp til øll viðkomandi etisk krøv viðvíkjandi óheftni. Vit samskifta um øll viðurskifti, sum kunnu hugsast at ávirka okkara óheftni, og har tað er viðkomandi, hvørji trygdartiltøk eru sett í verk.

Tórshavn, 28. februar 2020

**Januar P/F**
Løggilt grannskoðanarvirki
Skrásetingar nr. 5821

**Fróði Sivertsen**
statsaut. revisor

Herning, 28. februar 2020

**PricewaterhouseCoopers**
Statsautoriseret revisionspartnerselskab
CVR. nr. 3377 1231

**H.C. Krogh**
statsaut. revisor

# Partafelagsupplýsingar

## Felagið

Betri Pensjón P/F
Skrás. nr.: P/F 4627
Roknskaparár: 13
Heimstaður: Tórshavn

## Nevnd

Bogi Peturson Nielsen, formaður
Evy J. Jacobsen, næstforkvinna
Herjolvur P. Jakobsen
Petur Elias Nielsen

## Stjórn

Helgi L. Petersen, stjóri

## Grannskoðan

Januar løggilt grannskoðanarvirki P/F
PricewaterhouseCoopers Statsautoriseret Revisionspartnerselskab
Innanhýsis grannskoðanin í Betri samtakinum

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting.

**Betri Pensjón P/F**
Kongabrúgvin
Postboks 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo